

# Søgulig løta fyri Atlantsmótið

**Jan Müller**

06.10.2015 - 09:55

Oljan.fo

Nú um dagarnar var flaggskipið í oljuvinnuni eystan fyri føroyska markið doypt á skipasmiðjuni í Suðurkorea. Skipið hevur fingið navnið Glen Lyon og er eitt goymslu- og framleiðsluskip, FPSO, sum avloysir tað gamla á Schiehallion feltinum, ið er ein tann størsta yvirhøvur á bretska landgrunninum. Hon liggur skamt frá føroyska markinum og hevur alstóran týdning fyri bretska oljuframleiðslu í mong mong ár aftrat.

Skipið er 270 metrar langt og 52 metrar breitt. Við hesum skipinum kann framleiðslan halda fram til 2035.